# Forðingar beinast av vegnum fyri at fáa skeinkiloyvi í Føroyum

**Nú skal tað eisini verða lættari hjá útlendingum at koma upp í part í feløgum í Føroyum sum hava skeinkiloyvi**

RÚSDREKKALÓGIN
*Áki Bertholdsen*


*Nú skulu tað vera kommurnar og loyvisnevndin, sum í felag áseta, hvussu nógv skeinkiloyvi skulu vera í eini kommunu*

Nú skal tað verða lættari hjá útlendingum at koma upp í part í feløgum í Føroyum, sum hava skeinkiloyvi.

Tað heldur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum.

Eftir uppskotinum, sum hann nú roynr at fáa politiska undirtøku fyri um at broyta rúsdrekkalógina, og sum vit greiða frá í hinari greinini her á síðuni, er ætlanin at kravið um danskan heimarætt fyri at fáa skeinkiloyvi, skal fella burtur.

Grundgevingin er, at burtursæð frá norðurlendingum, skulu útlendingar hava arbeiðsloyvi fyri at kunna hava hotel ella matstovu í Føroyum.

Eftir galdandi lóg, skulu allir nevndarlimir í feløgum, sum hava, ella søkja um skeinkiloyvi í Føroyum, búgva í Føroyum.

Sostatt kann ein, sum býr uttanlands, ikki sita í nevnd í felagi, sum eigur gistingarhús ella matstovu við skeinkiloyvi.

Bjarni Djurholm heldur, at hetta er órímiligt og kann forða fyri, at útlendingur keypur ein part av partapengunum, ella allan sum hann er, í einum felagið, sum hevur skeinkiloyvi í Føroyum.

Ístaðin skjýtur hann upp, at hertir er tað nóg mikið um stjórnin og helvtin av nevndini í slíkum feløgum búgva í Føroyum. Tó skal loyvisnevndin kunna gera undantak í serligum førum.

### Kommunustýri og loyvisnevndir

Hereftir skal tað eisini verða kommunustýrini og loyvisnevndin, sum hava ábyrgdina av, hvussu nógv skeinkiloyvi kunnu gevast í hvørjari kommunu.

Í løtuni er tað landsstýrismaðurin, sum ásetur talið á skeinkiloyvum eftir tingingar við loyvisnevndina og bý- ella bygdaráðið.

Upprunaliga vórði Føroyar býttar sundur í sjey øki, men nú er hvør kommuna eitt serstakt loyvisøki.

Í løtuni er mannagongdin tann, at vil eitt bý- ella bygdaráð, at fleiri skeinkiloyvi skulu vera í kommununi, søkir tað til landsstýrismannin um at hækka talið.

Síðani verður málið sent loyvisnevndini, sum so letur landsstýrismanninum eitt ummæli og hann ásetur so talið.

Bjarni Djurholm heldur, at tíðin er farin frá hesi mannagongd og at hetta er harafturat óneyðuga stirvið.

Tí skjýtur hann upp, at hereftir skal loyvisnevndin hava eitt ummæli frá kommununi og at tað verður kommunurnar og loyvisnevndin í felag, sum gera av, hvussu nógv skeinkiloyvi kunnu vera í einari kommunu.

# Skal verða lættari at fáa skeinkiloyvi

**Nú skal tað vera einfaldari at fáa skeinkiloyvi í Føroyum og rúsdrekkalógin skal vera liðiligari enn hon er nú**

LÓGARBROYTING
*Áki Bertholdsen*


*Tey, sum halda brúdleyp, føðingardag ella aðrar hátíðardagar í bygdarhúsi ella samkomuhúsi, skulu nú eisini sleppa at skeinkja, uttan at gera seg til lógbrótara*

Nú skal tað í ávísum førum verða lættari at fáa loyvi at skeinkja í Føroyum.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður ætlar nú at broyta rúsdrekkalógina eitt sindur, so at hon ikki verður so stirvin og óliðilig at umsita, sum hon er nú.

Hann hevur gjørt eitt uppskot, sum er sent teimum ymsu flokkunum í samgonguni og tað verður eisini til viðgerðar á landsstýrisfundi fyrsta dagin.

Fær hann undirtøku fyri uppskotinum, verður tað lagt fyri Løgtingið.

Broytingarnar, sum ætlanin nú er at seta í verk, líkjast rættiliga nóg uppskotinum, sum varð lagt fram fyri einum ári síðani, men sum tað ikki eydnaðist at avgreiða fyri løgtingsvalið 30. apríl. Sostatt fall málið burtur, men nú roynir landsstýrismaðurin av nýggjum.

Uppskotið, sum vit hava fingið innlit í, snýr seg fyri tað mesta um at gera ymsar dagføringar í rúsdrekkalógini.

Mett verður ikki at broytingarnar fara at føra til, at nýtslan av rúsdrekka fer at økjast.

Heldur er endamálið við uppskotinum at rætta ávísar vansar við lógini. Og harumframt er endamálið at fáa skipað viðurskifti á økjum, har tað í dag verður skonkt undir óskipaðum viðurskiftum og við ongum eftirliti, sigur bjarnmi Djurholm í viðmerkingunum til uppskotið.

### Skeinkiloyvi til einstøk tiltøk

Eftir lógini er bara loyvt at skeinkja á støðum við skeinkiloyvi og loyvi at skeinkja kann einans verða veitt fólki og feløgum, sum hava gistingarhús ella matstovu.

Hinvegin er ikki heimild til at geva skeinkiloyvi til einstøk tiltøk.

Hóast hesar avmarkingar í lógini, verður skonkt uttan loyvi og eftirlit í sambandi við einstøk tiltøk, staðfestir landsstýrismaðurin.

Støðan í dag virkar tí ikki tálmandi upp á nýtsluna, men elvir hinvegin til, at drukkið verður undir óskipaðum viðurskiftum og uttan eftirlit.

Henda støða er íkki í samljóði við endamálið við rúsdrekkalógini og tað er, at rúsdrekkanýtslan á almennum støðum skal vera undir skipaðum viðurskiftum og at hon annars skal tálmast, sigur Bjarni Djurholm í uppskotinum.

Hann skjýtur tí upp, at tá ið skipað verður fyri einstøkum tiltøkum, skal tað verða heimild til at loyva fólki, ella felagi, sum frammanundan hevur skeinkiloyvi, til at skeinkja á hesum tiltøkum. Tað vil siga, at tað skal vera loyvt hjá einum, sum hevur loyvi, at skeinkja uttanfyri vanliga skeinkistaði, tá ið serlig tiltøk eru. Talan kann verða um veitslur, ráðstevnur, fundir, framsýningar, ella onnur tiltøk, har fólk, sum frammanundan hava skeinkiloyvi, verða biðin um at koma á staðið at standa fyri skeinkingini. Í serligum førum skal tað tó bera til at loyva fólki, sum ikki hevur skeinkiloyvi, at standa fyri skeinking, tá ið ongin loyvishavari er at átaka sær hetta.

Hetta er fyri, at tað eisini skal bera til at skeinkja á veitslum og øðrum tiltøkum úti á útoyggj, har onki skeinkiloyvi er uttan at bróta lógina.

Men í hesum sambandi ger landsstýrismaðurin greitt, at í hesum sambandi er tað av týdningi, at talan er um einstøk tiltøk.

– Tískil fevnir hendan ásetingin ikki um tiltøk, sum eru afturvendandi, ella reglulig, sigur hann.

### Skeinkja í privatum veitslum

Og nú ætlar landsstýrismaðurin eisini, at tað skal verða loyvt at skeinkja í privatum veitslum, sum verða hildnar í bygdar- ella samkomuhúsum og har tey, sum halda veitsluna, sjálvi skipa fyri skeinking og borðhaldi.

Tí tað er tað nevniliga ikki eftir galdandi rúsdrekkalóg.

Í løtuni er lógin soleiðis, at verður skonkt í brúdleypum, rundum føðingardøgum, ella øðrum veitslum, skulu tey, sum leiga bygdar- ella samkomuhúsið út, hava skeinkiloyvi eftir somu reglum sum hotel og matstovur.

Hetta merkir sostatt eisini, at hølið skal vera góðkent til tílíkt virksemi.

Men landsstýrismaðurin heldur ikki at aldargamli siðurin, har fólk sjálvi leiga høli at halda brúdleyp og aðrar veitslur í, og har tey sjálvi syrgja fyri borðreiðing, mati og drekka, eigur at verða fevndur av rúsdrekkalógini.

– Slíkar veitslur eru privatar og av slíkum slagi, at tær einsvæl kundi verið hildnar heima, um pláss var. Tá ið skonkt verður á slíkum veitslum, eigur tað tí heldur ikki at koma undir rusdrekkalógina, sigur Bjarni Djurholm.

Bæði rusdrekka- og Narkotikaráðið og loyvisnevndin mæla til, at tað verður sett úr gildi, at tað skal vera neyðugt við skeinkiloyvi undir slíkum umstøðum.



# Fiskimenn mugu fáa eina betri skipan í ALS

**– Fiskimenn mugu sleppa úr støðuni, har teir bert gjalda inn og ikki fáa úr skipanini, sigur Føroya Fiskimannafelag**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*


*Føroya Fiskimannafelag hevur boð uppá, hvussu viðurskiftini hjá fiskimonnum í ALS skulu loysast.*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Føroya Fiskimannafelag hevur fleiri ferðir heitt á avvarðandi myndugleikar um at geva fiskimonnum eina betri skipan í ALS. Tað gjørdi felagið eisini, tá ið lógin um barsilsskipan var til ummælis hjá felagnum.

Sum kunnugt, hevur sitandi samgonga boðað frá, at ALS-skipanin skal endurskoðast, og í løtuni liggur eitt uppskot í tinginum, sum ætlandi skal loysa spurningin, hvussu fiskimenn kunnu koma inn í ALS, tá ið skip liggja meira enn ætlað.

– Tað er einki dulsmál, at fiskimenn eru sera illa nøgdir við verandi skipan. Teir føla, at teir bert gjalda inn, samstundis sum allar møguligar forðingar eru fyri, at teir skulu fáa útgjald, tá ið teir hava tørv á útgjaldi.

Hetta sigur Føroya Fiskimannafelag í ársfrágreiðing síni, sum varð løgd fram á landsfundi felagsins beint fyri nýggjár.

– Vit hava lýst okkara sjónarmið í hesum sambandi í hvørjari ársfrágreiðing, sigur felagið.

Vist verður til eitt sakarmál, sum Føroya Skipara- og Navigatørfelag vann. Málið snúði seg um, nær fiskimenn kunnu roknast fyri at vera arbeiðsleysir. Hetta málið hevur ALS kært til landsrættin, og dómur er ikki fallin enn.

Føroya Fiskimannafelag heldur, at ALS - í staðin fyri at kæra - skuldi roynt at funnið eina rímiliga skipan, ið tekur hædd fyri viðurskiftunum hjá fiskimonnum mótvegis øðrum løntakarum.

FF vísir til egna uppskot sítt, sum sigur, at fiskimenn skulu kunna koma undir ALS, 1) tá ið skip av eini ella aðrari orsøk liggja meira enn ein mánaða, ella 2) tá ið miðal dagatalið hjá manningini umborð hevur verið minni enn 227 seinastu 12 mánaðirnar.
Orsøkin til talið 227 er, at hetta verður roknað sum eitt vanligt árligt arbeiðsdagatal hjá fólki á landi.

– Vit halda, at hetta uppskot er eitt gott grundarlag fyri eini rímiligari skipan fyri fiskimenn, sigur Føroya Fiskimannafelag.

# Til Danmarkar at syngja Kingo

**Kingobólkurin í Tjørnuvík er boðin til Danmarkar at syngja Kingo á hátíðarhaldi í samband við, at 300 ár eru liðin, síðan Thomas Kingo doyði**

HÁTÍÐARHALD
*Edvard Joensen*


*Asbjørn Djurhuus er ein teirra, sum fyrireikar sangferðina hjá Kingobólkinum í Tjørnuvík til Danmarkar á páskum*

**Tjørnuvík:**
Kingobólkurin í Tjørnuvík fer til Danmarkar á páskum. Ørindini eru at syngja gomlu Kingosálmarnar á hátíðarhaldi, sum hildið verður í Danmark í samband við, at 300 ár eru liðin, síðan Thomas Kingo doyði.

Ein av fyrireikarunum, Asbjørn Djurhuus, sigur, at tey millum annað skulu syngja í Fraugde á Fyn, har Thomas Kingo livdi seinastu árini og eisini doyði.

Hátíðarhald í samband við 300 ára deyðadag Kingo´s, sum er 14. oktober, verða hildin alt ár í Danmark. Tað er Keypmannahavnar biskuppur, sum skipar fyri, sigur Asbjørn Djurhuus.

Tjørnuvíkingar eru tey einastu í øllum heiminum, sum regluliga syngja gomlu Kingosálmarnar, og tað hava tey frætt í donsku kirkjuleiðsluni. Hildið varð tí sjálvsagt, at Kingobólkurin varð boðin at luttaka í einum slíkum hátíðarhaldi.

Tey vera gott 20 fólk í ferðalagnum, sum fer til Danmarkar á páskum, sigur Asbjørn Djurhuus.

Meira um ferðina verður at frætta í serblaðnum Vikuskifti, sum kemur í Sosialin leygardagin.

ÚTSØLAN
BYRJAR TÝSDAGIN 14. JANUAR
ÍTRÓTTUR Á GLYVRUM • Tel. 44 73 99